

## ÍF spælarar leingja sáttmálarnar

Bartal Eliasen, Nenad Saric og Alexandar Jovevic spæla allir í ÍF komandi tvey árini. Hóast brotasjógvarnir hjá ÍF eru tungir, nú liðið eftir øllum at døma noyðist úr Formuladeildini, so hava tey í felagnum als ikki givið skarvin yvir.

ÍF-stuðlarnir hava nú boðað frá, at sáttmálarnir hjá trimum av stuðulsspælarunum hjá felagnum eru longdir við tveimum árum. Hetta kann illa tulkast øðrvísi enn, at felagið framvegis vil sigla við fullum seglum. Eisini hóast ein niðurflyting skuldi komið upp á tal.

## VB fær serba

Kvinnurnar hjá VB hava mist nakrar av stuðulsleikararunum frá í fjør, og tí hevur felagið roynt at leita sær styrk uttanlands.

Síðan sunnudagin hevur serbiski hondbóltsleikarin Ivana Ljubicic royndarvant í felagnum, og formaðurin í VB, Jan Haldansen, váttar á heimasíðu felagsins, at VB og Ivana hava undirskrivað sáttmála fyri komandi kappingarár.

Ivana Ljubicic er 23 ára gomul og hevur fyrr spælt í bæði Serbia og í Italiu. Hon kann bæði spæla á bakkinum og á miðjuni. Ivana verður væntandi við á VB-liðinum komandi heimadyst, sum verður ímóti STÌF í næstu viku.

# Kennist næstan sum at flyta niður

**- Tað er ein ógvuliga beisk kensla, eg standi við beint nú, og tað kennist næstan sum um, at vit eru fluttir niður í 1. deild, segði Ronnie Samuelsen eftir dystin**

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Ronnie Samuelsen hevur verið millum týdningarmiklastu leikararnar hjá felagsliðnum í ár, og hevur hann stýrt miðvøllin við harðari hond. Hansara drúgvu royndir hava verið gull verdar fyri liðið, men nú hevur hann boðað frá, at hann gevst at spæla fótbólt. Tí gjørdist bitin helst uppaftur beiskari at svølgja, nú FM glapp honum av hondum í síðstu løtu.

– Tað er ein ógvuliga beisk kensla, eg standi við beint nú. Tað kennist næstan sum um, at vit eru fluttir niður í 1. deild. Men kanska um eina viku ella so, fara vit at síggja, at samanumtikið er hetta eitt fínt úrslit í ár, greiðir Ronnie Samuelsen frá.

EB/Streymur hevur ongantíð verið føroyameistari, men Ronnie hevur kortini roynt hetta við B36. Víkamaðurin viðgongur tó, at tað hevði verið heilt serstakt at vunnið FM við EB/Streymi.

– Tað hevði verið nakað heilt, heilt serligt at vunni við EB/Streymi, og eg ætlaði eisini so heilt víst at enda við gullinum um hálsin, men tað skuldi tað so ikki vera. Eg eri annars stak væl nøgdur við kappingina í ár, og eg haldi eisini at vit hava gjørt ein góðan figur, sigur Ronnie Samuelsen.

### Gott úrslit hóast alt

Seinastu dystirnar hevur tað tó ikki riggað heilt hjá felagsliðnum, og tað kostaði í síðsta enda føroyameistaraheitið.

– Vinnaratraditiónirnar eru ikki har. Tá á stóð hava vit ikki megnað tað, sum vit skuldu, og tá tað kom til stykkis, so megnaðu vit ikki at binda fyri.

– Í dag riggaði heldur ikki. Hann vildi ikki inn, men vit hava so væl og virðiliga kjansirnar. KÍ hevur hálvanannan kjans og teir fáa so eitt mál, staðfestir Ronnie Samuelsen.

– Nei, vit hava ikki verið nóg góðir seinastu dystirnar. Vit kundu fari við gullinum, men tað glapp. Eg haldi tó, at tá øll eru komin niður aftur á jørðina, so síggja vit helst, at hetta er eitt rættiliga gott úrslit hóast alt. Vit settu sum mál at røkka upp á medalju pláss, og tað náddu vit so væl og virðiliga, sigur Ronnie Samuelsen.

Í fekk EB/Streymur besta úrslitið í søgu felagsins, tá liðið endaði á fimta plássi í deildini. Í ár bøtti EB/Streymur aftur um hetta úrslit, tá teir endaðu nummar tvey, og so er spurningurin, um fólk kunnu loyva sær at vera vónbrotin av, at tað ikki eydnaðist at vinna FM.

– Ja, tað haldi eg avgjørt er rímiligt. Vit hava spælt ein tann besta fótbóltin sum er. Men HB hevur avgjørt eisini spælt væl, og teir kláraðu so tað, sum vit ikki megnaðu. Teir høvdu eisini marginalarnar við, sum skulu til fyri at vinna FM, og tað kemst helst av teirra vinnaratraditiónum, sum vit enn ikki hava, staðfestir Ronnie Samuelsen hjá EB/Streymi.




*– HB hevur avgjørt eisini spælt væl, og teir kláraðu so tað, sum vit ikki megnaðu, staðfestir Ronnie Samuelsen hjá EB/Streymi*

**FM í virkisfótbólti 2006**

Høvuðsstuðul og vinnari av kappingini 2005
formula.fo

Skipað verður fyri FM-kapping í virkisfótbólti í Gundadali leygardagin 4. november frá uml. kl. 9 til uml. kl. 18.

**Nakrar reglur fyri kappingina**
- Spælt verður á hálvum vølli
- Hvør dystur er 10 minuttir
- 7 leikarar eru á hvørjum liði + 5 skiftisleikarar
- Luttakandi leikarar mugu ikki hava spælt í Formuladeildini, 1. ella 2. deild ella í steypakappingini hjá FSF í ár
- Seinasta freist at boða frá luttøku er fríggjadagin 27. okt.
- Luttøkugjaldið er 600,- kr. fyri hvørt lið
- Møguligur ágóði av kappingini fer til uttanlandsferð hjá B36-piltum 2007

Luttakandi lið skulu tekna seg til kappingina við at faxa lepan niðanfyri.

SISERO

Fótbóltsfelagið B36 F.C. Tórshavn

Navn á liði/liðum
Arbeiðspláss
Kontaktfólk
Tel/e-mail

**FM í virkisfótbólti 2006 • Faxa seðilin til B36 á Fax nr. 31 80 36**